# ítróttur

Nr. 28 • hósdagur • 10. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gongur strúkandi hjá John

**Fyrrverandi føroyski landsliðsleikarin John Petersen hevur fingið eina flúgvandi byrjan í nýggja felagi sínum Holstebro. Í teimum trimum venjingardystunum, sum Holstebro higartil hevur spælt, hevur John skorað fimm ferðir**

ÚTISETI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ikki kann sigast annað, enn at John Petersen hevur gjørt vart við seg í nýggja felagi sínum, Holstebro Boldklub, sum til dagligt spælir í donsku 2. deild, ið er triðfremsta deildin í Danmark.



*John Petersen hevur fingið eina flúgvandi byrjan í Holstebro, har hann hevur skorað fimm mál í trimum teimum fyrstu venjingardystunum*

*savnsmynd*

### Fimm mál í trimum dystum

Sum vit eisini hava umrøtt í Sosialinum áður, so skeyt tvey mál í fyrsta venjingardystinum hjá Holstebro á árinum. Tá blivu bæði málini skotin upp á brotsspark, men í teimum næstu dystunum prógvaði John, at tað ikki bert er úr ellivu metrum, at hann finnur vegin til meskarnar.

Í næsta venjingardystinum leikti Holstebro móti Tjørring, og tá var John á vøllinum teir fyrstu 45 minuttirnar. Tá hevði John longu prógvað sítt virði við at hava skotið tvey mál fyri Holstebro. Fyrra málið kom, tá ið hann gjørdist leysur við málverjanum og hegnisliga lyfti upp um málverjan. Nakað seinni økti John til 2-0, tá ið hann skallaði bóltin í netið eftir innlegg úr høgru síðu.

Holstebro vann dystin 3-2, eftir at teir høvdu verið á odda 3-0 í hálvleikinum.

Mánakvøldið var so aftur ein venjingardystur á skránni. Hesaferð var mótstøðuliði Viborg Søndermarken, sum spælir í kvalifikatiónskappnigini til 2. deild. Holstebro vann dystin 4-1, og John Petersen skoraði málið til 2-0 miðskeiðis í fyrra hálvleiki.

Sostatt hevur John Petersen fingið eina flúgvandi byrjan í Holstebro, og spurningurin er so, um landsliðsvenjararnir fara at royna at lokka skálamannin at taka enn eitt tørn á landsliðnum.

# Eingin styrkur til VÍF

**Vestmenningar fara ikki at leita eftir styrki til liðið, nú tríggir av stuðulsleikarunum eru skaddir, og kappingin nærkast endanum**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur verið gitt, at VÍF fór at leita sær eftir onkrum spælara, sum kundi styrkt um liðið, nú vestmenningar hava mist Áka Olsen, Inga Olsen og Áka G. Olsen í fleiri av teimum avgerandi dystunum í endaspurtinum í landskappingini. Men formaðurin í VÍF vísir hesum gitingum aftur.



*VÍF fer ikki at leita eftir nøkrum avloysara fyri teir tríggjar skaddu lykaleikararnar, Áka G. Olsen, Áka Olsen og Inga Olsen.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Allir mugu lyfta

Eyðun Leo, formaður í VÍF, sigur, at spurningurin hevur verið umrøddur á nevndarfundi í VÍF, og leiðslan í felagnum hevur eisini viðgjørt málið saman við venjaranum Dia Midjord.

– Vit eru komin til ta niðurstøðu, at vit gera einki við tað. Tað fólkið, ið vit hava, noyðist nú at lyfta eitt sindur meiri, og allir noyðast at taka ábyrgd, sigur Eyðun Leo, sum viðgongur, at tað er ein sera stórur missur fyri liðið, at teir tríggir áðurnevndu leikararnir ikki eru tøkir næstu dystirnar.

Formaðurin í VÍF sigur eisini, at í slíkum málum, har støða skal takast til møguligan leikarastyrk, er tað venjarin, sum hevur seinasta orðið, og Dia Midjord hevur sagt, at tað verður tað fólkið, sum VÌF hevur, ið skal royna at verja oddasessin hjá liðnum.

# Ósigur til Holte

**Bárður Mikkelsen fekk skaða undir upphitingini, tá ið Holte IF tapti 2-3 fyri Middelfart VK í farnu viku.**

FLOGBÓLTSÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Dysturin móti Middelfart gjørdist dýrur fyri Holte, sum fekk ikki færri enn tríggjar mans skaddar í sambandi við dystin.

### Takladur av mótspælara

Sum áðurnevnt fekk Bárður skaða longu undir upphitingini, tá ið ein leikari hjá Middelfart, sum av einari ella aðrari orsøk var á Holte-hálvuni, rann inn í Bárð, sum koykti sær fótin. Hetta var dyggur smeitur fyri Holte, tí Bárður var einasti hevarin, ið teir høvdu við til dystin. Bárður royndi tó at spæla eina løtu, men tað var trupult hjá honum at flyta seg runt á vøllinum.

Bæði Steinar Eirikstoft og Ragnar í Haraldsstovu vóru eisini við á liðnum hjá Holte, og teir spældu báðir ein góðan dyst, frætta vit úr Danmark.

Middelfart vann fyrsta settið tepurt, men tvey tey næstu var tað Holte, sum var omaná. Síðani vann Middelfart fjórða settið, og tí var neyðugt við einum javnbrótara, sum Middelfart vann greitt 15-8. Holte IF liggur tó framvegis næstfremst í sínum bólki í kappingini um at vinna kvalifikatión til elitudeildina.

Ein annar føroyskur flogbóltsspælari í Danmark, Jóhann Nielsen, vann saman við liði sínum, Amager VK, 3-2 á Hvidovre í farnu viku. Eisini landsliðsleikarin Suni Juul Petersen er farin at spæla flogbólt í Danmark. Hann er farin til Odense í lestrarørindum og spælir nú við DHG Odense í endapælinum í elitudeildini. Fríggjakvøldið vunnu teir 3-2 á útivølli móti Lyngby Volley.

## Føroyskur dómari í finalunum

Tá ið steypafinalurnar í flogbólti verða leiktar komandi leygardag verður tað við einum føroyingi sum høvuðsdómara. Vanliga hevur Flogbóltssambandið fingið útlendskan dómara til finalurnar, men hesaferð verður tað okkara egni altjóða dómari, Jan Hentze, ið skal døma finalurnar millum ávíkavist TB og Mjølnir hjá kvinnunum og TB og SÍ hjá monnunum. Hjálpardómari hjá Jan Hentze verður Tummas Óli Mortensen.

**tn**